# TILTØK

**Missiónshúsið í Skopun**
Dýrabiðidag einki møti vegna møti í Skálavík.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn- og lovsangsløta, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betania, Skopun**
Leygardagin kl. 11 Smáir einglar møta, kl. 14 Sólstrálan, kl. 17 Stríðsmenn møta.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti.
Vælkomin í Betania.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Einki ungdómsmøti verður leygarkvøldið.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Einki møti verður sunnukvøldið vegna møtir í Hovi.

**Missiónshúsið í Hovi**
Um vikuskifti verða hesi evnismøtir við John S. Myllhamar, trúboðara.
Dýrabiðidag kl. 18 Evnið: Hugsa um skapara tín.
Leygardagin kl. 20 evnið: Røtt og rong læra um forbøn fyri sjúkum.
Sunnudagin kl. 15 evnið: Nærmissión og kl. 20 evnið: Dýrgripurin í leirkeri.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Dýrabiðidag kl. 18 Evangel. møti, Eingrim Holm talar.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti, Eddie Bech talar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betel, Vágur**
Dýra biðidag kl. 18 Evangel. fundur.
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur.
Mánadagin kl. 20 Bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 Uppbyggingarfundur.

**Samkoman Malta í DK**
Hóskvøldið 13. mai kl. 19.30 verður evangel. fundur í Mølleparken S. P. Møllevej 16c, Esbjerg.
Leygarkvøldið 15. mai kl. 19 verður evangel. fundur í Skolehjemmet Sønderlandevej 28, Sønderborg.
Sunnukvøldið 16. mai kl. 17 verður evangel. fundur í Staldgårdsgade 4, Vejle.
Talarar eru Levi Joensen og aðrir. Eftir fundirnar bjóða vit kaffi. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
***Mánadagur 3. mai***
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.30-18 Veving á loftinum
kl. 14-18 Kortspæl, telving, landastrok og onnur spøl. Tilmelding til døgurðan mikudag.
**Túrur í Kalsoynna mikudagin 5. mai. Vitja Húsar, Mikladal og Trøllanes. Úr Steinatúni kl. 8.10 aftur í Havn uml. 20.30 tíðina. Kostn. 200,- gjaldast áðrenn.**
***Týsdagur 4. mai***
kl. 10-11.30 Sangur, Óli Vang. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15 Suni F. Jacobsen sigur frá, tá ið hann kom til Havnar í 1945
***Mikudagur 5. mai***
Tilhaldið stongt. Túrur í Kalsoynna. Úr Steinatúni kl. 8.10 aftur í Havnini uml. 20.30.
***Hósdagur 6. mai***
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14-16 Boccia í kjallaranum
***Fríggjadagur 7. mai***
Dýri biðidagur

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Felagið Tórshavn – gongutúrur**
Sunnudagin 9. mai verður lættur gongutúrur: Kálvalíð-Bøsdalafoss-Trælanípan. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 14. Havi heit og góð gonguklæðir og drekkamunn við. Tilmelding.

**Tilhaldið Hugnin í Sandoynni**
Tilhaldið í Sandoynni er opið mánadag og mikudag frá kl. 14-17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.
***Mánadagin 10. mai*** kemur Absalon Matras úr Klaksvík at siga frá um Rumenia. Absalon hevur verið nógvar túrar í Rumenien við ymiskari neyðhjálp og hann kemur at siga okkum frá sínum upplivilsum har.

**Fløvi – dagtilhaldið fyri pensiónistar**
*í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum – allir pensionistar hjartaliga vælkomnir. Opið mánadag-fríggjadag kl. 1*5-18.
***Mánadagin 10. mai***
Fimleikur við Jóhannu Troest
***Týsdagin 11. mai***
Silkimáling v/ Paulinu Eliasen
***Mikudagin 12. mai***
Silkimáling v/ Paulinu Eliasen. Havið saks og knappanálir við
***Hósdagin 13. mai***
Prát og sangur
***Fríggjadagin 14. mai***
Opið hús

*Tú fært altíð ein góðan drekkamunn, somuleiðis eitt gott Guðs orð. Bløðini eru altíð til taks.*

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Vágs Pensionistafelag**
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur limafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini fært drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmøðrafelag. Allir pensionistar og øll omanfyri 60 ár eru vælkomin. Gerst limur í Vágs pensionistafelag.

**Spælistovan í meinigheitshúsinum**
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

**NA (Anomymir narkomanar)**
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

**ACA**
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 á Tinghúsvegi 37, Tórshavn. www.aca-danmark.dk.
E-mail: acafaroeislands@hotmail.com

**AA-fundir í Havn**
**Tinghúsvegur 37**
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.15
Mikudag: Sporafundur kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: kl. 9.00-10.00 opin fundur. Kl. 17.00–18.00
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Allir fundir eru roykfríir.

Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17. Síðsta sunnudag í mánaðinum er opin speakarafundur í Al-Anon, Tinghúsvegur 37. Telefontíð er fríggja-, leygar-, sunnu- og mánadag frá kl. 19-21 á tlf. 508030.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

## KONFIRMATIÓN

### Konfirmantar í Kvívíkar kirkju Dýra biðidag 7. mai

Rakul Joensen
Bjarni Williamsson Jørgensen
Sigmundur Petersen – øll úr Kvívík
Hjallgrímur Janusarson Vestergaard, Stykkið.

### Konfirmatión í Danmark

Sunnudagin 9. mai verður Bogi K. Jouritsen, sonur Anniku Jensen og Andreas K. Mouritsen, konfirmeraður í Emmersbæk kirkju. Adr.: Hotel Hirsthals, Hirsthals 9850.

## BRÚDLEYP

Dýra biðidag 7. mai giftast á Sýsluskrivstovuni í Klaksvík Guðrið Hansen, Vestmanna og Tummas Elnarson Justinussen, Leirvík. Dagurin verður hildin saman við familjuni á Hotel Norð á Veiðareiði.

7. mai kl. 16.00 giftast í Havnar kirkju Leila Petersen, Argir og Reinhard Dam, Hoyvík. Veitslan verður í B36-húsinum kl. 19.00 fyri innbodnum.

Leygardagin 8. mai kl. 12.00 giftast Oddvin Zachariasen og Tina Torkilsdóttir Johannesen, Hoyvík, í Havnar kirkju. Eftir vígsluna verður døgurði fyri innbodnum í roykstovuni í Kirkjubø. Nátturði verður í róðrarneystinum á Argjum kl. 20 fyri innbodnum.

Leygardagin 8. mai giftast í Prestagarðinum á Sandi Petrina Hentze og Fríði Nolsøe. Døgurði fyri innbodnum verður í Slavansdali. Tey, ið vilja gleða brúðarparið eru vælkomin inn á gólvið eftir kl. 18 heima hjá teimum.

Leygardagin 8. mai giftast Jógvan Poulsen og Astrið Breckmann. Vígslan verður kl. 13.00 í Samkomuni Immanuel. Veitslan verður fyri innbodnum.

## SILVURBRÚDLEYP

26. mai hava Hjørdis og Óli Reinert, Flatnagerði 3 í Havn verið gift í 25 ár. Silvurbrúdleypsveitsla verður hildin í Pálsstovu hvítusunnuaftan 29. mai kl. 19. Tey, ið vilja gleða silvurbrúðarparið við at koma í veitslu, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 315644, 228808 ella teldupost: Hjordisreinert@meyl.fo innan 15. mai.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*Men hann varð særdur vára synda vegna og sundurbrotin vára misgerða vegna; okkum til friðar kom revsingin niður á hann, og av sárum hans fingu vit heilsubót.*
*Jes 53,5*

Við hesum orðum byrjar leikstjórin og sjónleikarin Mel Gibson sín nógv umrødda film »The Passion Of The Christ«, sum í hesum døgum er at síggja í Havnar Bio. Hesin filmur hjá Mel Gibson er uttan iva tann mest blóðiga og sterka lýsingin av teimum seinastu 12 tímunum av Jesu lívi, sum nakrantíð er gjørd.

Vit skulu ikki dvølja við krossins pínu og ræðuleikar, fyri at dyrka harðskapin, men tí vit kunnu síggja kærleikan aftanfyri tað, sum hendi á Golgata.

Hví mátti Jesus ígjøgnum so nógva pínu?

Tí so nógv hevur tað kostað Gudi at frelsa okkum menniskju! Vit mugu ongantíð gloyma, hvat frelsa okkara hevur kostað.

Vit dylja endamálið við krossinum, um vit fjala, at tað var ein valdsgerð og ein ræðulig hending. Gera vit tað, so verða vit tey týdningarmiklu boðini fyri uttan, at synd og óndskapur liggur so djúpt í okkum, at einki minni enn hesin ræðuleiki var neyðugur fyri at frelsa okkum frá Guds vreiði.

Tað er ein freisting at pakka krossin inn í so nógvan hugnaligan tónleik og vakurleika, at hann hvørvur frá tí veruliga veruleikanum.

Á Golgata hoyra vit Jesus siga: – Guð mín, Guð mín, hví fórt tú frá mær?

Kjarnin í Kristi líðing er ikki ein spurningur um, hvussu sterk pínan var, men at Gud var farin frá honum. Ta líðingina var Jesus einsamallur um.

Her er tað, at hann skiftir um pláss við okkum. Her er tað, at kærleiki hansara vísir seg. Á krossinum er tað dómarin, ið sjálvur tekur dómin á seg, fyri at vit skuldu sleppa undan at koma í ta støðuna: at vera í ævinleikanum uttan Gud.

Hann gjørdi tað í staðin fyri meg og teg!

Vit hava nokk ein varhuga av, hvat tað vil siga, at eitt menniskja ger nakað vegna eitt annað, í teirra stað. Og so er Kristi gerningur í okkara stað kortini so óendaliga nógv meira enn vit kunnu ímynda okkum.

Barabbas, uppreistrarmaðurin og drápsmaðurin, kann hjálpa okkum eitt vet víðari við at skilja, hvønn týdning, tað hevur, at Jesus doyði í okkara stað

Meiri enn nakar annar, upplivdi Barabbas persónliga, hvønn týdning, tað hevur, at Jesus doyði í staðin fyri hann.

Tann deyðadømdi uppreistrarmaðurin hevði sitið í einum fangatippi og hevði ikki ánilsi fyri at hann fór at verða sleptur leysur. Hann sleppur leysur, tí ein annar fór út á rættarstaðin – vegna Barabbas og okkum øll.

Barabbas – tað eru tú og eg. Plássini er býtt um, ein er farin í títt og mítt stað. Tað var ein, ið ofraði seg fyri at vit kundu sleppa undan. Jesus doyði fyri at taka ta revsing, sum vit høvdu uppiborið.

Tað hendi fyri meg og teg.

Í krossins pínu liggur Guds hjarta.

**Jóannis Fonsdal, prestur**



## FILMSTEIGURIN

# Van Helsing

Í endanum av 19 øld trúðu fólk, at sólin var risin yvir ein nýggjan heim, har vísund og skilvísi vildi skúgva til viks neyð og vantrúgv. Í veruleikanum var tað kanska ein einstakur maður, ið framvegis lúrdi í skugganum, sum hevur heiðurin av at hava jagstrað burtur myrkursins skapningar: Gabriel van Helsing

Jagstran hansara er blóðug og uttan náði, so í lógarinnar eygum er ein hann brotsmaður. Van Helsing verður sjálvur ein jagstraður maður, men sum jekari rekur hann offrið framman fyri sær – og tey tykjast øll at hava sama mál: Ein lítlan blett á landakortið, har framstigini enn ikki hava nátt, og har yvirtrúgvin og óndskapurin framvegis ræður. Eitt stað kalla Transsylvania.

Her skal Van Helsing hitta vandamikla fíggjunda sín, Dracula Greiva, men samstundis fer hann at søkka djúpt niður í tann loynidóm, sum fjalir fortíð hansara. Tað verður tann ultimativa uppgerðin millum gott og ónt, men lukkuvís stríðist hann ikki einsamallur. Van Helsing fær hjálp frá vøkru sigøjnaraprinsessuni, Anna, ið sum tann síðsta í ætt síni stríðist fyri at tveita familjunnar forbannilsi frá sær. Eigsini hon má gera upp við Dracula. Og við hansara tríggjar vøkru, men blóðtystu brúðrar. Við varúlvum og við ódjórinum hjá Dr. Frankenstein!

Stephen Sommer hevur kavað niður í kjallaran hjá Universals, filmsfelagnum og gitni filmsmonstrini har úr dvala. Í stríðnum móti óndskapi hevur hann rekruttera Hugh Jackman og Kate Beckinsale, meðan Richard Roxburgh setur tennirnar í Dracula-leiklutin – og í tær tríggjar vøkru brúðrarnar, Elena Anaya, Silvia Colloca og Josie Maran.








Fríggjadagin 07.05. kl. 20$^{45}$ Fríggjadagin 07.05. kl. 23$^{30}$
Leygardagin 08.05. kl. 20$^{45}$ Leygardagin 08.05. kl. 23$^{30}$
Sunnudagin 09.05. kl. 19$^{45}$ Sunnudagin 09.05. kl. 22$^{30}$

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**

**HAVNAR BIO**
P Tlf. 31 19 56 P
www.bio.fo




Fríggjadagin 07.05. kl. 18$^{00}$ Fríggjadagin 07.05. kl. 20$^{15}$
Leygardagin 08.05. kl. 18$^{00}$ Leygardagin 08.05. kl. 20$^{15}$
Sunnudagin 09.05. kl. 17$^{00}$ Sunnudagin 09.05. kl. 19$^{15}$




Fríggjadagin 07.05. kl. 23$^{00}$ Leygardagin 08.05. kl. 23$^{00}$
Sunnudagin 09.05. kl. 22$^{00}$

**KOMANDI FILMAR**




**Frumsýning – Billettprísur: 80,- kr. – Forsølan er byrjað**
Mikudagin 19.05. kl. 19$^{00}$ Mikudagin 19.05. kl. 22$^{30}$




**Heimsfrumsýning – Forsølan er byrjað**
Fríggjadagin 28.05. kl. 20$^{15}$ Fríggjadagin 28.05. kl. 23$^{00}$